# handVERKARIN

4. ÁRSFJÓRÐINGUR 2008 | BLAÐ NR. 28 | HAVNAR HANDVERKARAFELAG



handverkarin_28_2008.indd 1 4/12/08 16:27:21

# Vit líta aftur um bak

Nú árið er farið at halla kunnu vit ikki siga annað enn, at 2008 var hendingaríkt.

Men alt var ikki lætt; tað gav okkum eisini torførar avbjóðingar.

Í hesum sambandi er fyrst at nevna álvarsomu fíggjarkreppuna, sum tók seg upp í heyst. Hóast vit ikki enn hava merkt avleiðingar, sum kunnu samanberast við støðuna hjá okkara nærmasta granna, so eru kortini tekin um, at vit ikki sleppa heilt snikkaleys. Tað er t.d. onki at ivast í, at talið av arbeiðsleysum føroyingum er vaksandi.

Tað skal kortini vera mín vón, at hesir trupulleikar ikki vera drúgvir. Vónandi megna vit at venda gongdini soleiðis, at tey, sum eru vorðin arbeiðsleys sleppa aftur í vinnu skjótast gjørligt.

Fyrr í ár boðaði politiski myndugleikin frá stórum broytingum á útlendingaøkinum. Fakfeløgini dugdu – alt fyri eitt – at síggja, at talan var um eina sera óhepna broyting. Tí gjørdu vit sjálvandi vart við, at hetta fór ikki at vera ein góð skipan, hvørki fyri okkum føroyingar ella teir útlendingar, sum koma til Føroya at arbeiða.

Men politiski myndugleikin valdi at venda fakfeløgunum bakið. Og – tí verri – mugu vit í dag sanna, at broytingin fekk júst tær neiligu avleiðingar, sum fakfeløgini boðaðu myndugleikunum frá.

Lat okkum her nevna eitt ítøkiligt dømi. Talan er um eina fyritøku, sum fær útlendskar handverkarar at koma til Føroya at arbeiða. Vit hava prógv fyri, at hesir útlendingar ikki verða kunnaðir um føroyska arbeiðsmarknaðin. Útlendingar vita t.d. ikki hvørja minstuløn ein handverkari í Føroyum hevur rætt til.

Vit hava eisini prógv fyri, at tá vit hava kunnað útlendingar um lønarviðurskifti í Føroyum, so hevur tað fingið álvarsamar avleiðingar fyri somu útlendingar. Teir eru – alt fyri eitt – uppsagdir og sendir av landinum.

Hetta hendir hóast politiski myndugleikin hevur boðað frá, at tey, sum koma til Føroyar at arbeiða, skulu kunnast um føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Tí standa vit nú ráðaleys og spyrja: Hvør hevur svikið, er tað politiska skipanin, ella liggur trupulleikin í eini umsiting, ið ikki røkir sína skyldu.

Nú jólini standa fyri durum vóna vit vissuliga, at hesin órættvísi atburður móti útlendingum í Føroyum verður steðgaður sum skjótast, og helst áðrenn vit koma inn í jólahalguna.

At enda fara vit her, at ynskja limunum við familju eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Eli Brimsvík, formaður.

## Innihald

Vit lýta aftur um bak 2 • Mona Lisa og Leonardo 3 •Eydnusamur um altartalvuna 4

**Útgevari:** Havnar Handverkarafelag • Sjúrðargøta 20 • Box 203 • 110 Tórshavn
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eli Brimsvík
**Blaðstjórn:** Media • **Umbróting og prent:** Gramar
Havnar Handverkarafelag gevur Handverkaran út 4 ferðir um árið.
**Avgreiðsla:** Yrkadagar frá kl. 9 til 12 • Hósdag er eisini avgreiðsla frá kl. 15 til 18.
Tel. 35 48 00 • Fax 35 48 01 • Teldupostur: handverk@handverk.fo • www.handverk.fo



handverkarin_28_2008.indd 2 4/12/08 16:27:21

# Mona Lisa og Leonardo

**Málningurin "Mona Lisa" verður sagdur at vera heimsins kendasti málningur. Málningurin er voriðin kendari enn Leonardi da Vinci, sum málaði "Mona Lisu".**



*Leonardo da Vinci málaði Monu Lisu lidna í 1519.*

Leonardo da Vinci varð borin í heim 15. apríl 1452 í lítla býnum Vinci í Italia, einar 100 kilometrar frá Firenze. Mamma hansara, Caterina, var av bóndaætt, meðan pápin, Piero d Antonio, var advokatur.

Mamman var fátæk og hevði tí ikki ráð at hava sonin hjá sær. Leonardo vaks upp hjá pápanum, sum var giftur við aðrari kvinnu.

## Listarligar gávur

Tað sást longu, tá Leonardo var smádrongur, at hann hevði listarligar gávur, og tá hann var 15 ára gamal, tók faðirin hann við sær til listamálaran og myndahøggaran Verocchio, og hjá honum kom hann so í læru.

Tað var skjótt, at fólk løgdu merki til henda unga listamannin. Gamalt er at siga, at lærlingurin er ikki meira enn meistarin, men tað var skjótt, at Leonardo gav lærara sínum onki eftir, hvørki sum listamálari ella myndahøggari, og tað var skjótt, at fólk fóru at bíleggja arbeiði frá Leonardo.

## Ein óvani

Tað verður sagt um Leonardo, at hann hevði ein ringan óvana; hann brúkti ofta óvanliga langa tíð til at gera eitt listaverk liðugt. Tí var ofta torført hjá honum at halda avtalur við tey, sum bíløgdu listaverk hjá honum. Tá hann í huganum hevði sæð, hvussu verkið fór at vera, so var tað fyri honum so at siga liðugt, og tí misti hann hugin at gera listaverkið liðugt. Hann fór heldur í holt við okkurt nýtt. Hann hevði eina æviga tráan eftir at royna nýggjar leiðir og nýggjar avbjóðingar.

## Góð listarlig kor

Tá á døgum, í seinnu helvt av 15. øld, vóru mangir sera dugnaligir listamenn í Italia. Vit kunnu nevna Botticelli úr Firenze, sum var 8 ár eldri enn Leonardo, og sum gjørdist vinmaður hansara. Aðrir víðagitnir listamenn, sum livdu í Italia um somu tíð vóru t.d. Michelangelo, Rafael og Tizian, sum allir vóru eitt sindur yngri enn Leonardo.

**Framhald á síðu 22**



handverkarin_28_2008.indd 3 4/12/08 16:27:22

# Sverri Dahl:
# Eydnusamur um altartalvuna

**»Eg var eydnusamur allan mín uppvøkstur sunnudag eftir sunnudag at sita í fremsta stóli á loftinum konufólkamegin, haðani altartalvan sæst eina best. Eg var meira og meira hugtikin av henni og góður við hana, og trongdin at vita nakað meira um hana vaks.«**



Øll kunna fegnast um henda dýrgrip, sum í roynd og veru er djúp, hugvekjandi prædika. Hugsi eisini, at tað var ynski listamansins. Hann hevur ikki bara málað eitt dapurt vónloysis gravhelli, men savnaði, ljósið frá Golgata uttanfyri sum vónarglæmu á hellisgólvið, har, ið Kristi likam skuldi hvíla.

Tað var einaferð ein beiskur langafríggjadagur, men tað varð eisini – og er um ævir – fagur páskamorgun.

## Hugtikin og nærlagdur

Sum vit síggja í brotinum omanfyri, var Sverri Dahl stórliga hugtikin av altartalvuni í Havnar kirkju. Men áhugi hansara var ikki avmarkaður til altartalvuna. Heldur mugu vit siga, at hann meginpartin av livi sínum, eldhugaður arbeiddi fyri at finna svar til allar søguligar spurningar, sum høvdu samband við Havnar kirkju. Vit eiga eisini at nevna, at hann skrivaða hóp av greinum um kirkjuna og kirkjulutir hennara í bløðum og tíðarritum. Hann hevði eisini áhugaverdar fyrilestrar í Útvarpi Føroya um kirkjuna, og í 1968 skrivaði hann bókina "Havnar kirkja". Í øllum hesum arbeiði var hann heilhjartaður og nærlagdur, og ikki minst djarvur; tá hann greiddi frá sínum granskingararbeiði, niðurstøðum og sjónarmiðum. Kom nýtt tilfar undan kavi hugsaði hann seg gjølla um fyri at fáa tað sett inn í ein størri samanhang og møguliga gera nýggjar niðurstøður.

## 1830-altartalvan

Núverandi altartalvu í Dómkirkjuni nevndi Sverri Dahl »1830-altartalvan«. Hana lýsti hann við hesi hugtakandi frágreiðing:

"Inn í myrkt helli bera tveir menn Jesu likam á einari váð, og eru við at leggja tað niður á klæði fremst á hellisgólvinum í miðju myndarinnar.

Jesu likam er nakið, bara sveipað í eitt lendaklæði, høvur hansara hvílir á vinstru øksl, og vinstri armur hongur linur niður móti gólvinum. Út frá Jesu likami, sum nærum er einasta ljóskeldan í tí dapurmyrka hellinum, geiðslar ljós á gólvið og á tey fólkini, sum inni eru. Annað ljós kemur inn gjøgnum hellismunnan frá Golgataheygnum, ið hómast uttan fyri, aftast á málninginum. Myndin er rólig og fast



handverkarin_28_2008.indd 4 4/12/08 16:27:23

uppbygd, tað er álvarsamur friður yvir henni, og tó sýnist sum fólkini eru í sorgartungari rørung uttanum kolasvarta høvdið á øðrum beraranum, ið ivaleyst er ein av húskøllum Jósefs úr Arimateu.
Vinstrumegin eru 3 konufólk, ein teirra, ið man vera Maria Magdalena, er fallið í óvit, og hinar, helst Salóme og Maria, móðir Jóses, ella hin Maria, styðja hana.

Aftan fyri húskallarnar standa sterk í sorg síni Maria, móður Jesu, og Jóhannes. Høgrumegin frammarlaga stendur Jósef úr Arimateu í síðum kappa, tignarligur og tungur í huga.

At altartalvan er framúrskarandi listaverk eru øll tey, ið sæð hana hava, samd um. Men tað undarliga er, at eingin við vissu hevur vitað, hvaðan hon er komin ella hvør, ið málað hana hevur.

## Einki meistaramerki

Málningurin er, innan fyri gyltu listarnar, 252 cm. breiður og 187 cm. høgur.

Myndin er: "Gravlegging Jesu". Hon er málað á lørift. Meistaramerki sæst einki; hevur tað verið, kann tað vera horvið, tá ið talvan er reinsað ella á annan hátt umvæld.

Vit vita, at Ernst Trier, listamaður, í 1878 varð biðin um at umbøta altartalvuna. Tað gjørdi hann saman við Buch, ið er kønur gullgyllari. Ernst Trier skrivar í frágreiðingini: Maleriet renset, tavlens profiler og Det malede fyrretræ på rammeværket renset og restaureret. Kostnaðurin var 5.215 kr.

Málningurin er seinni vorðin reinsaður við hvørt, bæði fyri dust, ið legst á fernisið, og stearinið, tí blást hevur verður á hann frá altarljósunum.

Vit vita eisini at listamálarin Svend Rønne, bróðir Jørgen Falk Rønne, Sandoyarprest, umvældi altartalvuna í 1890-árunum. Tað var við játtan frá Løgtinginum. Svend Rønne hevur eisini málað altartalvuna til Dímunar kirkju, mynd: "Emmaus", 1891, og Sumbiar kirkju, mynd: "Kristus í Getsemane" í 1896.

## Eingin krossur

Kirkjan varð vígd í 1788, og í 1865 varð hon umvæld og umbygd. Tá varð serliga gjørt hetta: "Den er udvidet med en Tilbygning mod Øst 3½ Alen lang og 12 Alen bred". Tað er



innvikið í kórinum, har ið altarið nú stendur, og uppi yvir tí er altartalvan.

Roknskaparbókin fyri Suðurstreymoyar prestagjald, 1782-1872, skilar til at kirkjan í 1830 eigur tvær altartalvur "... hvoraf den ene nye med et forgyldt Kors, der dog ei for Loftets Lavhed kan anbringes".

Hetta seinasta, at ein krossur hevði verið, og at pláss ikki var til hansara, setti Sverri sær fyri at fáa fulla greiðu á.

## Ramman um altartalvuna

Um rammuna, sum er um altartalvuna sigur Sverri: Ramman stendur á gólvinum hvørjumegin altarið og røkkur heilt upp undir loftið í innvikinum. Hon er evnað úr samanneglduм furufjalum, tí opin innan, brúnmálað uttan. Vangarnir eru í 5 ymiskum breiðum pørtum, tann niðasti 52 cm., næstniðasti 41 cm. og hinir 30. cm breiðir. Teir eru í erva bundnir saman við o.u. 50 cm breiðum tvørbita, men í neðra bara við mjáari karmfjøl undir myndini.



*Modell av "Norsku Løvu", sum fórst á Lambavík 1707.*



*Messing ljósaarmur við innskrift er gáva frá Friedrich Popping, yvirkeypmanni í 1678.*

Tess vegna er opið – tjúkd vanganna – aftan fyri altarið inn móti bróstinum. Millum allar rammupartarnar eru hjólaðir og annaðhvørt gullbronsaðir ella gullblaðlagdir listar av sama slagi sum teir um sjálvan málningin.

Ovasti rammulistin, hann ið myndar yvirtromina, er prýddur við blaðskurðaverkið, ein sonevndur "blaðstavur", og hann sýnist hava upprunaliga gylling við blaðgulli.

## Ovasti parturin

Hæddin frá gólvinum til omaná við yvirtromini er 367 cm. og á henni standa litskornar fjalir heilt upp undir loftið. Gyllingin á hesum fjalum, ið vit hereftir nevna "krúnuna" er ljósari enn hon á listanum, serliga blaðstavinum. Tað er tí spurningurin, um allir partar eru frá somu tíð, og um krúnan ikki altíð bara hevur verið gullbronsað.

Skreytskorna krúnan er fleirliðað. Hvørjumegin úti við endarnar á yvirtromini stendur



handverkarin_28_2008.indd 6 4/12/08 16:27:27

pláta sneidd sum skjøldur ella sum spíssbogað vindeyga, ið er fylt við framskornum palmettukendum gyltum prýðum á brúnmálaðum botni.

## Stórar útreiðslur

Sverri Dahl setti sær fyri at fáa greiði á øllum ósvaraðum spurningum um altartalvuna, eisini hvør hevði málað altartalvuna og, hvussu hon var komin til Føroya.

Í hesum sambandi leitaði hann í gomlum roknskaparskjølum; hesum greiddi hann soleiðis frá: Útreiðslurnar til nýggju altartalvuna vóru rættuliga stórar, tilsamans 227 ríkisbankadálar og 16 shillingar.

Á rokningini varð víst til trý undirskjøli: Bilag 11, 12 og 13. Har er einki viðmerkt um, hvaðan talvan er komin.

## Statens Museum for Kunst

Sverri hevur greitt frá, at ein dagin í 1969 sigur Elin Jacobsen, sum eitt skifti hevði starvast á Statens Museum for Kunst í Keypmannahavn, frá, at hon haðani var biðin um at senda teimum mátini á altartalvuni í Havnar kirkju, tí at teir eru við at skráseta ognir sínar, serliga tær, ið eru lántar út sum "depositum". Og framhaldandi sigur hann: Við tí í huga, at útreiðslur kirkjunar til henda málning vóru so stórar, meira enn 227 ríkisbankdálar. Tað var eftir tátíðar keypiorku nógvur peningur, og harafturat fyri eina gávu, kann tað ikki undra, at eg varð ovfarin, og neyvan fekk meg at trúgva tí, at vit ikki eiga talvuna, men at hon bara er lánt okkum í varðveitslu.

## Blunck Ditlev málaði

Sverri skrivaði tí beinanvegin til stjóran fyri Statens Museum for Kunst, Jørn Rubow, um altartalvuna. Hann svaraði Sverra aftur í brævi tann 22. januar 1970, at altartalvan, ið er málningur: "Christi Gravlæggelse" tilhører ganske rigtig Statens Museum for Kunst, men må betragtes som depositum på ubegrænset tid" og at hon er "afleveret til amtman Tillisch 26. oktober 1829".



*Blunck Ditlev málaði altartalvuna.*

Jørn Rubow var so beinasamur eisini at senda ljósprent av øllum skjølum um málningin og vísa mær, hvar ið eg kundi leita fyri at fáa meira at vita. Eftir skrásetingarkortinum á Kunstmuseet hevur málningurin savnsnummar 93, listamaðurin er Blunck Ditlev. Evni: "Christi Gravkæggelse, Joh. 19 cap,37-42 v.

Hann var framsýndur á Charlottenborg 1825, keyptur har til samlingen "Det Kongelige Kunstkammer" 1825. Lat tað við tað sama verða sagt, at Kunstmuseet av serligari atvold í brævi dagfest 1. mai 1986 boðar Ejvindi Vilhelm, biskupi frá, at: "Den Kongelige Malerisamling efter at sagen har været forelagt, har tilkendegivet, at man anser maleriet, som har



handverkarin_28_2008.indd 7 4/12/08 16:27:27



*Eldra altartalvan, sum nú hongur á norðursíðuni.*

befundet sig i Thorshavn siden 1829, for definitivt".

Vit vita nú eisini, at Havnar kirkja eigur hesa mikilsverdu altartalvuna, leggur Sverri afturat.

## Listamálarin Ditlev Conrad Blunck

Listamaðurin Ditlev Conrad, sum hevur málað altartalvuna, varð føddur 1798 í Holstein, og doyði í Hamburg 1854, ógiftur.

Hann var næmingur á Kunstakademiet í Keypmannahavn 1814-27, har ið lærarar hansara vóru J.L. Lund og C.W. Eckerberg (maðurin, ið málað hevur altartalvuna í Oyndarfirði).

Blunck var námsferðir í Munchen, Dresden, Florens og Rom, og hevði javnan framsýningar á Charlottenborg í Keypmannahavn 1818-49. Frá 1844 búði hann eina tíð í Wien, seinni í Hamburg.

Kongur sýndi honum mikla vælvild millum annað við næstan hvørt ár at keypa ein ella fleiri málningar frá honum.

Blunck fekst á ungum árum nógv við at "copiera" franskar og italskar listamenn, tí man málningaháttur hansara hava tann dám, ið hann hevur fingið serkønar at gita franskan ella italskan listamann hava málað altartalvu okkara.

Hann varð hildin vera sera hegnigur og vandin teknari. Sagt verður um hann: "Bluncks Kolorit er ejendommelig lys, navnlig i hans tidligere Billeder. Uagetet han af Samtiden ansaas for Historie og Genremaler, og ogsaa ofte har arbejdet paa dette Felt, synes han at have sin Force i de smaa Portrætter, hvor hans minutiøse Penselføring kommer bedst til sin Ret."

Ein hin mest umhildni andlitsmálningur hansara er av gitna myndahøggaranum B. Thorvaldsen.

## Ósvaraðir spurningar

Sverri greiðir víðari frá: Eftir eru ósvaraðir spurningar; teir um rammuna, krossin, kostnaðin, og hvar, ið krossurin nú man vera.

Um so er, at teir høgu harrar í Keypmannahavn hava sagt: "Málningin skulu tey fáa, men fyri rammuna mega tey gjalda", og eru listarnir og yvirprýðini á henni, sum mær sýnist, upprunaliga løgd við gulli eins og krossurin man hava verið tað, tá er gátan gitað, men giting er ikki nóg mikið. Hon má verða prógvað.

Tær fyrr nevndu útreiðslurnar, sum tóktust vera undrunarvert miklar, munnu helst vera goymdar í skjali nevnt Bilag 11. Í 1830 eru útreiðslurnar hjá kirkjuni tilsamans 330 ríkisbankdálar og 93 skillingar. Av teimum eru "Omkostninger Altertalve 227 Rbdlr. 16 Sk." Hetta er nógvur peningur. At umrokna hann í okkara peningavirði er ógjørligt, men leysliga man tað vera 10.000-20.000 kr. (mett í 1987)



handverkarin_28_2008.indd 8 4/12/08 16:27:28



og tað fyri eina gávu frá kongi sendari higar við einum av kongsins skipum, tað ljóðar lítið trúligt.

## Skjølini nr. 11 og 12

Funnið er nógv umtalaða Bilag 11, og tað hava vit Honnu Absalonsen, skrivara á Føroyamálsdeildini, fyri at takka. Tá ið hon í 1976 arbeiddi á Landsarkivet for Sjælland í Keypmannahavn, bað eg hana gera so væl at vita, um meira var har at finna um altartalvuna. Væl og víða hava hon og antikvararnir Finn Andersen og Grethe Ilsøe leitað, og eydnan var við teimum. Hanna boðar í brævi dagfest 29.11.1976 mær frá, at tey hava funnið skjølini nr. 11 og 12. í Sydstrøm Kirkers Regnskaber 1751-1839. Umframt gjørdu tey sær ómak at lata meg fáa frásagnir um menninar, sum smíðaðu rammuna og krossin.

Tey skjøl, ið nú eru komin undan kavi, sýna, at áðurnevndi Spengler biður álitismann sín, restauratorin í De Kongelige Malerisamlinger, Møller, um at fáa smiðir og listamenn at smíða rammuna og krossin beinanvegin og senda alt saman við málninginum higar við sama skipi á vári 1830.

## Møller, Dyrwetter og Bredelnbech

Eg havi áður viðmerkt, hvørjir teir vóru, sum útvegaðu okkum talvuna. Má tí heldur eisini siga, hvørjir smíðaðu, listskóru og gyltu rammuna og krossin, nú eg havi fingið tað at vita. Jens Peder Møller, føddur 1783 og deyður 1854 var professari, landslagsmálari og í 1814 settur sum konservator við Malerisamlingen. Jochum Dyrwetter var snikkarameistari og Bernard Bredelnbech var málarameistari. Rokningarnar frá teimum siga so nógv um virði rammurnar, at tað trúliga hevur áhuga at hoyra tað mesta av teimum. Eisini tí, at tær eru tað mikið og leingi saknaðu Bilag No.11 og 12.

## Alterets Sirater og Korset forgylt

Regning over Maler- Forgylderarbejde paa et Alter efter Herr Professor og Kongelig Landsskabsmaler J. P. Møllers ordre: Alterets Sirater og Korset forgylt. Summa beregnes 30 Rbdlr. Det øvrige Træverk malet med Oliefarver og udsparrede Lister og Ornamenter 12 Rbdlr. For bladene paaGesimsen tillige med Paasætningen betalt 6 Rbdlr. Summa 48 Rbdlr.
18. mars 1830. Bredelnbeck.

## Professor og Ridder Møller

Hin roknigin er: Efter Herr Professor og Ridder Møllers Ordre og Anmodning forfærdiget følgende:

En ny Tavle af Fyrretræ 5 Alen og 4 tommer



handverkarin_28_2008.indd 9 4/12/08 16:27:30

bred, 6 Alen høj foruden Korset – ansa eftir tí – og med sammenslaaet Bagklædning.

For Maleriet med Materialer, Snedkers og Drejers Arbejde tilsammen 75 Rbdlr. Og hann hevur har afturat latið smíða kassar og pakkað, pakkitilfar o.s.fr., alt fyri 6 Rbdlr. og 3 Mark. Summa 122 Rbdlr. 17 Mark. Og hetta er 20. mars 1830. Dyrwetter.

## Rokningin frá Møller til Tillisch

Og síðani rokningin frá Møller til Tillisch: Beregning over Udgifterne ved den af Hans Majestæt Kongen til Færøerne skænkede Altertavle.

Snedkernes Regning med Billedhugger- og Drejearbejde indbefattet 83 Rbdlr. For trende pakkasser og indpakning 39 Rbdlr. Malernes regning tilligemed Forsættelse og Fernisering og Tegninger til Haandværkerne 50 Rbdlr. Transport til Postskibet fra Christiansborg 5 Rbdlr. og Drikkepenge til Svende og Drenge 2 Rbdlr.

Tilsammen 227 Rbdlr. 16 Skilling.
Kjøbenhavn den 21. Mars 1830.
Ærbødigst J.P. Møller, Charlottenborg.

Og fyri henda pening er kvittan:

Omstaaende 227 Rbdlr. 16 sk. Er mig af den Kongelige Færøske Handel for Thorshavn Kirkes Regning udbetalt, hvorfor hermed in duplo kviteres.
Kjøbenhavn 23. Marts 1830.
J. P. Møller.

227 Ríkisbankdálar 16 skillingar! – Nú passa peningarnir!. Teir eru fyri rammu og kross og pakkitilfar.

## Arbeiðsløn í Havn

Bilag 12 er arbeiðsløn í Havn: Arbejde ved Thorshavns Kirke ved Altertavlen og Alterfoden 1 Rbdlr.
Thorshavn 27. Maj, betalt N. Winther.

Niels Christoffer Winther var føddur 1776 og doyr 1864 og var snikkari í Havn.
Bilag 13 er ikki funnið. Tí vita vit ikki, hvør timburmaðurin var.
Niels Winther fær løn sína goldna av Sydstrømø Kirkes Handelskonto.
Færø Amtskontor 28. Maj 1830.
J. B. Gaard, sign.

## Krossurin, ið hvarv

Sverri arbeiddi miðvíst, hann kannaði skjøl av ymiskum slagi og fann oftast svar til teir spurningar, sum hann setti sær. Men hann rendi seg eisini í spurningar, sum ikki vóru lættir at loysa.

Sum tað framgongur av tí, sum er nevnt omanfyri, er einginiviumattil 1830-altartalvuna var gjørdur ein krossur. Í roknskaparbókini hjá kirkjuni stendur um krossin: ".. forgyldt Kors, der dog ei for Loftets Lavhed kan anbringes". Og sum vit kunnu ætla, tók Sverri hetta sum eina avbjóðing. Hann setti sær fyri at kanna, hvat var vorðið av hesum krossi, "sum pláss ikki var fyri."

## Nólsoyar kirkja

Ymiskar søgur hava verið um henda kross. Ein var, at krossurin var latin Nólsoyar kirkju. Í Nólsoyar kirkju er ein trækrossur, og tí kannaði Sverri eisini henda møguleika, og kom til hesa niðurstøðu:

"Nólsoyar kirkja varð vígd í 1863, og í roknskapi hennara 1864 verður nevnt: Et forgylt Kors paa Alteret tilkommet 1863. Gave fra Meningheden. Hetta skrivar Andreas Djurhuus og má tí vera satt.



*Krossurin, ið varð gjørdur til altartalvuna í Havnar kirkju stendur nú í kirkjuni á Strondum.*



handverkarin_28_2008.indd 10 4/12/08 16:27:31



*Lestrarpulturin er úr mahogny, frá 1866*

Hann skrásetur eisini gávur frá sær sjálvum, gipstalvu við mynd: Jesus signar tey smáu børnini. Rætt er óivað eisini, at krossurin er komin úr Havn, sum frásøgur vita at siga, men hann er tó ikki krossurin, ið hoyrdi til 1830-rammuna.

## Krossurin í Sjóar kirkju

Lykilin til spurningin um krossin fann Sverri í eini roknskaparbók; har stendur: "Bortkommet er et forgylt Kors, overladt til Strænder Kirke på Østerø", og 1835 fær Havnar kirkja 10 ríkisdálar og 51 skillingar fyri hana. Sama upphæddin kemur eisini fyri í roknskaparbók fyri Eysturoyar prestagjald, har tilskilað er, at hon er fyri: "Et forgylt Kors fra Thorshavns kirke.

Sverri tekur soleiðis til "Krossurin í Sjóvar kirkju hevur verið og er lagdur við blaðgulli. Hann er 97 cm. høgur, krossarmarnir við tvørtræi 37 cm. langt, er vakur, men einfaldur og hevur ongan skreytskurð, bara heldur grunt útholaður innan, so at mjá og eitt sindur framhevjað rond er allan vegin runt útjaðaran. Eyðkenni hansara er, at allir armendar eru tilevnaðir sum smærubløð, listevni, ið hevur verið nýtt í øldir. Eftir sniði hóskar hann væl til strangt uppbygdu rammuna í Havnar kirkju.
Við tað, at krossurin í Sjóvar kirkju beinleiðis sigst vera úr Havnar kirkju skuldi einki ivamál verið um hann longur. Hann er 1830-krossurin."



*Sverri Dahl, fyrrv. landsantikvarur.*

## Granskarin kom á mál

Nýggjársdag 1987 hevði Sverri Dahl síðsta fyrilestur sín í Útvarpi Føroya um granskingararbeiði viðvíkjandi 1830-altartalvuni. Tann fyrilesturin var samstundis endin á einum fruktagóðum samstarvi millum henda søgufróða mann og Útvarp Føroya, tí bert nakrar mánaðir seinni, í mai 1987, legði Sverri Dahl, landsantikvarur, frá sær med alla. Honum hava vit nógv fyri at takka.



handverkarin_28_2008.indd 11 4/12/08 16:27:33

# Frá Havnar kirkju til Dómkirkju

**Eitt tað fyrsta vit vita um søguna hjá Dómkirkju okkara, Havnar kirkju, er at finna í roknskaparbókini hjá kirkjuni. Har sæst, at í 1783 er tilfar keypt og goldið til nýggja kirkju í Tórshavn. Og í somu bók síggja vit, at tær fyrstu lønirnar til teir, sum bygdu kirkjuna, vóru goldnar í 1784.**




## Kirkjustaðurin verður fluttur

Í Føroyum hevur verið siðvenja, at nýggjar kirkjur eru bygdar áleið har, sum kirkjurnar frammanundan høvdu staðið. Men so var ikki í hesum føri; fornið kirkjustaðurin í Havn varð úti á Reyni. Seinasta kirkjan á hesum staði varð bygd í 1609. Í eini frágreiðing um nýggju kirkjuna verður sagt, at kirkjan verður bygd "norden for byen". Forvitnisligt er eisini at lesa, at byggilendi á hesum staði er so dýrt, at serlig hjálp má fáast: "For at den nye Kirke kunde blive opført paa den bekostelige grund inde ved Byen, har nogle i Menigheden sammenskudt og givet 100 Gylden." Tað var mett at vera sera nógvur peningur tá, so grundstykkið var dýrt.

## Stór kirkja

Av tí at bert nakrar fáar av tekningunum, sum kirkjan er bygd eftir, eru varðveittar, og at kirkjan seinni er umvæld og umbygd, so er ymiskt, sum vit ikki vita um upprunaligu kirkjuna.

Sverri Dahl, fornfrøðingur, skrivar soleiðis um upprunaligu kirkjuna. Hon var smíðað sum gomlu bygdakirkjur okkara, bara nógv størri, ikki meira enn 3½ alin styttri enn tann, sum nú stendur, og tó vóru tá bara u.l. 600 fólk í Tórshavnar sókn.

## Upprunaliga kirkjan

Mett verður, at kirkjan innan hevur verið 23 m long og 9 m breið. Út frá norðursíðuni og suðursíðuni vóru, beint vestan fyri kórið, útbygningar. Av teimum var tann á suðursíðuni forkirkja, sum vit síggja á tekningini niðanfyri. Upprunaliga forkirkjan varð tikin niður í 1865. Ístaðin varð nýggj forkirkja gjørd í vestara enda undir torninum. Útbygningurin á norðursíðuni var prestastova, sakristi, sum hann er enn. Grundin var laðað av gróti og hvítkálkað. Klædningurin var svart tjøraður, vindeyguni



handverkarin_28_2008.indd 12 4/12/08 16:27:33




## Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · articon@articon.fo · www.articon.fo




SPEKT stataut.revisorar Spf.
spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34 · Faks 34 34 35
Heiðavegur 15 · Postsmoga190 · 600 Saltangará · Tel 474 474 · Faks 474 475

SPEKT statsaut. revisorar



handverkarin_28_2008.indd 13 4/12/08 16:27:34



*Tekning av Havnar kirkju áðrenn hon varð umbygd í 1865.*

## Tekju av fløgugróti

Upprunaliga hevði kirkjan flagtekju. Vit vita ikki við vissu, hvat ár flagið varð tikið av, og fløgugrót lagt á i staðin, men helst var tað í 1863. Hetta er sama árið, sum Nólsoyar kirkja verður bygd og fær fløgugrót á tekjuna. Fløgugrótið kom úr Wales í Bretlandi, og verður vanligt kirkjutekjutilfar i Føroyum.

hvítmálað eins og tornið, sum tykist hava hóskað væl til hesa kirkju. Upprunaliga var hon takt við nævur og flag.

## Roknskaparbókin

Roknskaparbókin 1783-1888 sigur, at keypt vóru 28 smærri og 14 størri vindeygu. Myndir vísa, at í skipinum vóru 5 vindeygu á suðursíðuni. Vestast á norðursíðuni vóru 2 smá vindeygu ovarlaga, og 4 stór í kórinum, 1 stórt hvørjumegin. Í báðum útbygningunum vóru 2 vindeygu. Omanfyri hvítmálaðu breiðu dyrnar í vesturendanum var eitt vindeyga. Um vindeygu vóru í eysturendanum vita vit ikki. Tá ið kirkjan var liðug lupu nøkur vindeygu av; tey vóru seld Hvalvíkar kirkju.

Innan var hon ivaleyst ómálað, var opin upp í tróðrið, og hevði loft, pulpitur, á suðursíðuni. Innan var hon prýdd við tí mesta, sum var í gomlu kirkjuni frá 1677. Av tí er tað nógva varðveitt enn.

Nýggja kirkjan var liðug í 1788, og var vígd 3. sunnudag í advent. Prósturin, ið vígdi hana, var Andreas Djurhuus, hin eldri; próstur 1785-1814.

## Guðbrandur Sigurðsson

Í 1862 kom ungur íslendingur, Guðbrandur Sigurðsson, til Føroya. Sagt hevur verið, at hann helst ikki hevði ætlað at steðgað leingi í Føroyum, men mangt kom at laga seg øðrvísi. Guðbrandur var byggikønur maður, sum tørvur tá var á í Føroyum.

Guðbrandur stóð í læru, og búði eisini, hjá kenda íslendska byggimeistaranum Jakob Sveinsson í Reykjavík, har hann var avlærdur í 1858.

Stutt eftir at Guðbrandur var komin til Føroya var heitt á hann um at standa fyri bygging av nýggjari kirkju suðuri í Vági.

J. P. Gregoriussen, arkitektur sigur um Guðbrand, at hann eigur bróðurpartin, tá ið ræður um kirkjubygging í Føroyum, í seinni helvt av 19. øld, serliga sæð frá einum byggilistarligum sjónarmiði. J. P. Gregoriussen sigur um kirkjuna, ið Guðbrandur bygdi suðuri í Vági, at hon var eitt satt byggilistarverk.

## Kirkjan verður heildarumbygd

Í 1865 var støða tikin til at heildarumbyggja Havnar kirkju. Heitt varð á Guðbrand Sigurðs-



handverkarin_28_2008.indd 14 4/12/08 16:27:36



*Doypifuntur frá 1865, ið Guðbrandur Gigurðsson gjørdi*

son um at standa fyri hesum arbeiði. Arkitektar meta, at hetta var ein sera torfør uppgáva, sum hann kortini kom sera væl frá.

Tunga fløgusteintekjan varð liggjandi á meðan umbyggingararbeiði fór fram. Bitarnir verða allir sum ein sagaðir av og úrtiknir (ein biti hevur verið fyri hvørt sperrupar).

Nýggj innara syll er ísett báðumegin, og jarnspenni fest millum hesar syllar, fyri hvørjar u.l. 3 metrar.

## Broytingarnar

Kirkjan verður longd 3½ alin eystureftir. Hetta er innvikið í kórinum, har sum altartalvan nú stendur.

Upprunaliga var pulpitur bara á sunnaru síðu, nú verður tað í báðum síðum við 14 stólum. Niðri í kirkjuni vera 44 stólar. Forkirkjan, sum áður var á suðursíðuni, verður tikin niður, og nýggj forkirkja verður í staðin bygd í vestara enda. Upprunaligu vindeyguni, sum vóru lág, men í tveimum hæddum, verða skift út við færri, men nógv hægri vindeygu.

Tornið verður umbygt; tað var upprunaliga bara ein hædd. Nú vera tvær hæddir, ein til kirkjuklokkuna og ein til urverk og klokkuspæl.

## Hválvið býtt sundur í puntar

Upprunaliga var kirkjan opin upp í tróðrið. Nú far kirkjan hválv, sum í erva verður vatnrætt, tí hanabitarnir forða fyri at farið verður hægri upp í boga við tí. Eins og í Vágs kirkju verður hválvið býtt sundur í puntar, blámálað og blankar stjørnur settar í miðjuna á hvørjum punti. Hetta er ímyndanin av sjálvum himmalinum.

Fyrimyndin til hesi puntutu hválv, bæði í Íslandi og Føroyum, er uttan iva stóra hválvið í dómkirkjuni i Keypmannahavn. Har er hválvið múrað í ferhyrntum kasettum, sum puntarnir í okkara kirkjum er eftirgerð av.

## Skjótt og gott

Umbyggingararbeiðið byrjar tíðliga á sumri



*Skýrnarfatið frá 1601 er ein tann elsti kirkjuluturin í Føroyum.*



handverkarin_28_2008.indd 15 4/12/08 16:27:37



*Altartalvan stendur í tí lítla útbygninginum. Tann longri við 4 vindeygum er bygdur seinni, og er skrivstova.*

1865, og longu í desember sama ár var arbeiði frá hondini. Tað má sigast at vera eitt bragd. Guðbrandur Sigurðsson og manning hansara loystu uppgávu sína bæði skjótt og væl.

Tá ið kirkjan varð bygd í 1788 búðu umleið 600 fólk í Havn, og tá kirkjan varð umbygd í 1865 var fólkatalið í Havn omanfyri 900, so upprunaliga kirkjan hevur verið sera stór í mun til fólkatalið tá.

## Klokkuspælið

Tá gamla Nótafelagið fyrst í 1950-árunum varð niðurlagt og ognir tess seldar, var peningurin nýttur sum gáva til klokkuspæl í Havnar kirkju. Hetta tí, at í gomlum døgum vóru nótirnar goymdar á kirkjuloftinum.

Havnar kommuna gav í 1988 kirkjuni nýtt klokkuspæl, sum er elektroniskt stýrt við fleiri løgum. Frammanundan var eittans lag.

## Poul Sørensen, deknur

Poul Sørensen, sum var deknur í Havnar kirkju í 25 ár, hevur skrivað um nakrar av broytingunum, sum eru framdar í kirkjuni meðan hann var deknur.

Um broytingar, sum vóru gjørdar í 1964 skrivar hann soleiðis: Í norðursíðuni í forkirkjuni er lítið rúm. Fyrr gekk trappan av loftinum konufólkamegin – niður í hetta rúm. Samstundis var úthurðin á norðursíðuni vanliga opin, so hetta rúm var eitt slag av gjøgnumgongd.

## Trappan vend

Fyri at fáa betri nyttu burturúr hesum rúmi er trappan vend, soleiðis, at hon nú gongur beint niður í sjálva forkirkjuna. Við hesum fekst eitt rúm hjá fólki at bíða í og at hampa seg í, t.d. til barnadóp og brúdleyps.

Um somu tíð varð ovasta loft víðkað, soleiðis at forsíðan verður bein og meira pláss fæst frammanfyri orglið til sangarar. Styrkt varð við jarnbjálka og sverari jarnsúlum bæði á loftinum niðriundir og í sjálvum kirkjurúminum.

## Norska Løva

Lat okkum enda hesa grein við eini stuttari frásøgn um skipið “Norska Løva”.

Skipið, sum hongur niður úr loftinum í Havnar kirkju, er model av Norsku Løvu, sum ein av manningini sigst hava gjørt, og latið sum gávu til Havnar kirkju.

Norska Løva rak – í einum ódnarveðri – á land, og fór í knús á Lambavík 31. desember 1707. Talan er um eitt skip, sum eftir tíðini var rættuliga stórt. Manningin taldi 120. Danski søgufrøðingurin Kay Larsen skrivar soleiðis um Norsku Løvu: “Skibet var Ostindefareren “Norske Løve”, der førte 28-36 Kanoner, hvoraf de fleste var 6 pd.´s, altsaa et stort Skyts. Norske Løve var en Tremaster og ført af Roluf Mencke (af København). Det fik Søpas i København 26. Septbr. 1707 – og var altsaa paa Udrejsen til Trankebar, da det forliste. Det sejlede samman med en anden Ostindefarer “Prinsesse Sophie Hedevig”, som førtes af Berendt Mikkelsen.

Skibene havde ret store Pengebeløb med sig ud til Indkøb af Varer i Indien. De fleste af Pengekisterne fra Norske Løve skal være reddet og hjemsendt til København.



handverkarin_28_2008.indd 16 4/12/08 16:27:38



sansir.fo

# Lat heldur okkum gera tað...

Húsavarðartænastan er altíð klár. Vit gera tímasáttmálar ella heildarloysnir til virkir og stovnar, har vit altíð eru til reiðar at gera umvælingar ella aðrar uppgávur – alt samdøgrið.

**...húsavarðaarbeiði**
**...alt snikkara- og timburarbeiði**
**...umvælingar**
**...sethúsabygging**

Tel 565589 - 565590
hvt@kallnet.fo, Fax 315590

**Húsavarðartænastan**

**Ognað tær tín egna húsavørð**

Málarameistararnir
# FALKENBERG
Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny







handverkarin_28_2008.indd 18 4/12/08 16:27:39









handverkarin_28_2008.indd 19 4/12/08 16:27:41









handverkarin_28_2008.indd 20 4/12/08 16:27:42

alka

einføld trygging

ALKA - Engelholm Allé 1 - Hoje Taastrup - 2630 Taastrup - Danmark

XL BYG Balslev.fo




www.balslev.fo



handverkarin_28_2008.indd 21 4/12/08 16:27:44

## Leonardo og heimsins kendasti málningur

*Framhald av síðu 3*



*Málningur eftir Leonardo da Vinci.*

Um hesa tíðina høvdu listafólk góðar umstøður í Italia. Tey sum sótu við valdinum í landinum høvdu tokka til list og veittu listafólki dyggan stuðul.

Tað er onki at ivist í, at hetta var orsøkin til, at stór list blómaði í Italia um hetta mundið.

### Milano

Ein av týðandi monnunum, sum hevði stóran áhuga fyri list, og sum javnan veitti ungum listafólki dyggan stuðul var Lorenzo fúrsti av Medici. Her eigur at vera nevnt, at Botticelli var hoffmálari hjá Lorenzo og, at Botticelli fekk fúrstan at veita vinmanninum stuðul. Hetta var helst beinleiðis orsøkin til, at Leonardo gjørdist sendimaður hjá Lorenzo í Milano. Í Milano kom Leonardo í samband við hertogan Lodovico Sforza, sum kom at hava stóran týdning fyri listamannin. Í Milano kom Leonardo at avrika nøkur av sínum størstu listaverkum. Tað eigur at vera nevnt, at um hetta mundið kom hann eisini í samband við aðrar týðandi menn, sum veittu honum stuðul; vit kunnu nevna Leo X páva og Cesare Borgia.

### Lærumeistarin

Verroccio, sum Leonardo stóð í læru hjá, var eisini stórur listamaður. Á verkstaði hansara arbeiddu fleiri næmingar, og tað er vanlig hugsan, at fleiri av kendu listaverkunum hjá Verroccio – í stóran mun – eru framd av næmingum hansara. Í hesum sambandi kunnu vit nevna, at Leonardo eigur ein part av einum kendum listaverki hjá Verroccio. Talan er um listaverkið "Dópur Krists"; sagt verður, at Leonardo hevur málað ein eingil, sum er longst vinstrumegin í hesi mynd.

### Sjálvstøðugur listamaður

Tað var tað sama, tá ið Leonardo gjørdist egin harri. Hann fekk sær eisini lærlingar, sum gjørdu nógv av tí grovasta arbeiðinum t.d. tá standmyndir skuldu gerast.

Tað mundi eisini gerast fyri neyðini, tí annars høvdu tær helst ongantíð verið lidnar. Tað gav at bíta við riddarastandmyndini av Francesco Sforza, sum ongantíð varð gjørd liðug; hon verður tó mett at vera eitt framúrskarandi listaverk. Henda standmynd varð tí verri oyðiløgd, tá ið fransmenn tóku Milano í 1499. Vit vita kortini, hvussu hon hevur verið, tí Leonardo gjørdi vanliga nógv tekniarbeiði, áðrenn hann fór í holt við eitt listaverk, og teknari var hann framúr góður. Og tað vil so væl til, at tekningarnar til hestastandmyndina eru til, so vit vita hvussu hon átti at sæð út, tá ið hon var fullgjørd, og listamaðurin hevði lagt síðstu hon á verkið.



handverkarin_28_2008.indd 22 4/12/08 16:27:44



## Listaverkið Mona Lisa

Vit vita, at Leonardo da Vinci avrikaði nógv sum listamaður, men tí verri mugu vit sanna, at tað eru ikki nógv listaverk til skjals eftir hann.

Tey fáu, sum eru varðveitt eru kortini mikil megnarverk, sum eru væl kend og tiltikin um allan heim.

Kendasta listaverk hansara "Mona Lisa" ella "La Gioconda", sum hesin málningur eisini verður nevndur, er mynd av konu áður nevnda Franceco Gioconda.

Leonardo málaði Monu Lisu eitt tíðarskeið hann var staddur í Firenze. Tað sigst, at hann arbeiddi við hesum málningi í 4 ár. Málningurin er í dag partur av einum stórum fronskum listasavni í Louvre í Paris. Málningurin er ein sannur magnetur fyri savnið. Meginparturin av ferðafólkunum, sum vitja Paris vilja síggja heimsins kendasta málning.

Tað, sum hugtekur fólk, tá tey síggja Mona Lisu er, at hóast eyguni á henni tykjast álvarsom, so er kortini eisini eitt bros at hóma í andliti hennara.

Mong undrast og gruna yvir, hvat smílið sigur, sum liggur í andliti hennara, meðan eyguni eru álvarsom og eitt sindur hugtung.

Í 1911 varð listaverkið stolið, og myndin var burtur eina tíð, men vónleyst var hjá tjóvunum at selja eitt so kent listaverk, og ein vakran dag varð málningurin í loynd borin aftur til savnið. Hendingin fekk nógva umtalu, og hevði við sær, at Mona Lisa gjørdist kendari enn hon var frammanundan.

## Heilaga kvøldmáltíðin

Ein annar – ikki minni kendur – málningur hjá Leonardo er "Heilaga kvøldmáltíðin", sum hann málaði 1495-1498 til kleystrið Santa Maria delle Granzia í Milano.

Hetta er ein ógvuliga stórur málningur, sum strekkir seg um allan endaveggin í einum kapelli. Persónarnir eru meira enn í likamsstødd, men tí verri er so lítið gott eftir av hesum tiltikna listaverki.

Tá á døgum var fresko tann vanligasti málningahátturin, men Leonardo, sum altíð hevði hug at royna okkurt nýtt, nýtti tempera, tí oljumálingin var ikki uppfunnin tá. Við temperamáling verður littilfarið rivið út í vatn, og til at fáa tað at hefta, lótu teir eggjareyða rørdan upp í edikk uppí. Men hetta er onki haldgott tilfar, og tað var longu, meðan Leonardo livdi, at hetta mikla listaverk var illa farið, og nú er ikki nógv eftir av upprunaverkinum



## Eitt undur

Tað var eitt undur, at hesin málningur ikki varð fullkomiliga oyðilagdur undir seinna heimsbardaga. Tá bardagar vóru í økinum datt ein



handverkarin_28_2008.indd 23 4/12/08 16:27:45



*Um Leonardo da Vinci (1452-1519) verður ofta sagt, at hann var flogvitið, ið bar av øðrum. Hann átti framúr evni at brúka alla vitan, sum var tá í tíðini, og hann var tikin úr leikum í so mongum. Ikki bara var hann málari og myndahøggari, men eisini byggilistafrøðingur, alisfrøðingur, lækni, plantufrøðingur o.a.m. Leonardo da Vinci var fyri sína tíð. Hann teknaði ótrúligar maskinur: stríðsvogn, fallskjól og flogfør, sum vit síggja omanfyri..*

bumba niður í kapellið og legði tað nærmast í oyði. Tað sum undraði var, at tá bardagin var av stóð bert ein múrur uppi; - tað var múrurin við Heilagu Kvøldmáltíðini.

Heilaga Kvøldmáltíðin var ein av teimum mongu listaverkunum hjá Leonardo, sum hann ikki fekk gjørt liðugt, sum hann hevði ætlað. Tað sigst at ætlanin var, at Jesus skuldi hava andlitið av listamanninum, men Leonardo fekk seg ongantíð til at fullfíggjað myndina við hesum andlitinum.

Annars gjørdi hann sær ómátaliga stóran ómak við málninginum. Tað sigst, at hann



gekk allan tann langa teinin gjøgnum býin til kleystrið, men tá ið hann so best hevði fingið pensilin í hondina, gjørdi hann bert eitt einasta strok við honum, men so gavst hann og fór heimaftur, tí andin var ikki yvir honum. Men aðrar dagar kundi hann mála frá morgni til myrkurs í fleiri dagar upp í slag uttan stundir til at njóta vátt ella turt.

## Sera stóra ávirkan

Í 16 ár búði Leonardo hjá Lodovico il moro í Milano, men so fór hann fyrst til Firenze og síðan til Rom í tænastu hjá Leo tíggjunda páva, og síni seinastu ár var hann við hovið hjá Fransi 1.

Leonardo setti tann lombardiska málaraskúlan á stovn, og frá hesum skúla koma nógvir kendir listamenn. So stórt árin hevði Leonardo á næmingar sínar, at eftirtíðin mangan hevur verið í iva um, antin tað mundi vera næmingurin ella meistarin, sum málað hevði.

## Nógv áhugamál

Umframt at Leonardo var framúrskarandi listamaður bæði til tekning, máling og myndahøgging, so hevði hann eisini áhuga fyri sálarfrøði, ljósfrøði, ljóðfrøði, plantufrøði, jarðfrøði, stjørnufrøði, læknafrøði, krígskynstri, tónleiki og matematikk. Serliga stóran áhuga hevði



handverkarin_28_2008.indd 24 4/12/08 16:27:47

hann fyri anatomi, og tað kom honum til góðar bæði sum málari og serliga sum myndahøggari.

Tað var ikki einans likamsbygnaðurin hjá menniskjanum, ið hann legði seg eftir, men eisini hjá dýrum, fuglum og skriðdýrum. Hann kannaði t.d. eygnasteinarnar hjá ugluni, tunguna hjá spettuni, mønina hjá skrubbtussum og heilan hjá menniskjanum.

## Frammanfyri sína tíð

Eina tíð, meðan hann var í Milano, arbeiddi Leonardo sum verkfrøðingur, og í mongum var hann so ógvuliga langt frammanfyri sína tíð.

Til eru tekningar, sum hann hevur gjørt av eini borimaskinu, eini súkklu, einum pansaravogni, einum undirvatnsbáti, eini flúgvimaskinu og eini tyrlu. Hetta eru alt tól, sum samtíðarfólk hansara hvørki kendu ella droymdu um. Men tey gjørdust kortini vanlig fleiri 100 ár seinni. Mong hildu hann vera nakað langt frá veruleikanum, og mettu hann tí vera heilavillan.

## Frans fyrsti í Fraklandi

Frans fyrsti í Fraklandi, sum hertók Milano í 1515, gjørdist sera hugtikin av Leonardo, serliga tí hann hevði so nógvar ymiskar gávur. Frans gjørdist serliga hugtikin av hansara frásøgugávum, Leonardo var forteljari av Guds náði. Frans gjørdist so mikið hugtikin av Leonardo, at hann bjóðaði honum at koma til Fraklands at búgva. Hann beyð honum góðar



umstøður og góð kor. Leonardo tók av, og fór í 1516 úr Italia og búsetti seg í nánd av kongsborgini við Amboise. Har búði hann í nøkur ár til hann andaðist í 1519.

"Leonardo var ein dámligur maður, sá væl út og var væl limaður. Hárið var vakurt bylgja og væl røkt. Hann gekk í reyðum kyrtli, sum røkk niður á knæ, meðan samtíðarmenn hansara gingu í fótsíðum klæðum". Soleiðis sigur ein samtíðarmaður um hann. Leonardo málaði ein hóp av sjálvsmyndum; fleiri teirra eru varðveittar.

## Rithøvundurin Leonardo

At enda fara vit at nevna, at Leonardo da Vinci eisini royndi seg sum rithøvund.

Tað slagið av teksti, sum hann skrivaði mest av er tað, sum vit vanliga nevna fablar.






handverkarin_28_2008.indd 25 4/12/08 16:27:48







handverkarin_28_2008.indd 26 4/12/08 16:27:49

Hetta er eitt rættuliga gamalt slag av skaldskapi. Ein tann kendasti rithøvundurin á hesum øki er Esop, sum livdi í Grikkalandi í 6. øld f. Kr. Hansara fablar eru týddir til flestu tungumál. Jákup Dahl týddi teir til føroyskt undir heitinum Esops dømi.



Fablar eru vanliga stuttar søgur, og persónarnir eru helst dýr sum duga at tala og siga menniskjunum nógvar sannleikar.

Hjá Leonardo da Vinci eru tað ikki einans djórini, sum duga at tosa, men eisini pappírið og blekkið, kavin, vatnið, berjatræið og myrtan, alt bæði livandi og deytt í natúruni dugir at siga eina søgu, sum vit, um vit duga at lurta, kunna læra okkurt av.

Fyri at vísa, hvussu væl Leonardo dugir at siga frá, skulu vit her taka fram ein av hansara fablum sum eitur: Meyran og hveitikornið.

## Søgan um meyruna og hveitikornið

Eitt hveitikorn, sum lá og sløddist, tá kornið var innheystað, bíðaði nú bara eftir, at eitt æl skuldi koma av himli, so at tað kundi sleppa at fjala seg í moldini.

Tá kom ein meyra fram á hveitikornið. Hon tók tað upp á bakið og fór knógvandi við tí til meyrutúgvuna, sum hon nóg illa hómaði langt burtur.

Hon gekk og gekk, men tað var fyri henni sum um hveitikornið tyngdist alt meira og meira.

"Hví letur tú meg ikki bara verða liggjandi" spurdi hveitikornið. Meyran svaraði: "Lati eg teg liggja, so hava vit onki at liva av í vetur. Vit eru nógvar meyrur, og allar skulu vit hvør sær hjálpa til at bera allan tann mat, vit kunnu finna, heim í matgoymsluna".

"Men eg eri ikki skapt bara til at verða etið," helt hveitikornið fram. "Eg eri eitt livandi fræ, og ætlanin er, at eg skal verða til ein vøkstur. Men hoyr meg, kæra meyra, latið okkum báðar gera ein sáttmála".

Meyran var nú so mikið mó, at hon mátti hvíla seg eina løtu. Tá hon legði hveitikornið frá sær spurdi hon: "Hvussu skal tann sáttmálin vera?".

"Um tú letur meg sleppa at liggja her í opinekruni", segði hveitikornið, "og ikki dregur meg við tær yvir í meyrutúgvuna, so skal eg næsta ár geva tær 100 hveitikorn javnstór við meg".

Meyran hugdi ivasom upp á hveitikornið. "Ja, kæra meyra, hesum skalt tú trúgva, sum eg sigi tær. Letur tú meg liggja, so gevi eg tær 100 ferðir meg sjálvan, 100 hveitikorn til túgvu tína."

Meyran hugsaði: "100 hveitikorn – í staðin fyri eitt, – tað ljóðar ótrúliga gott, men hvussu kann eg tryggja mær tað?".

Tí spurdi hon: "Hvussu kann tað lata seg gera?".

"Tað er ein gáta. Tað er lívsins gáta. Ger eitt lítið hol í moldina, legg meg í tað, og kom aftur um eitt ár".

Nú gekk eitt ár, og tá meyran kom aftur sá hon, at hveitikornið hevði hildið orð.



handverkarin_28_2008.indd 27 4/12/08 16:27:49

# Bíligari Betri Beinleiðis

Endamál felagsins er at kunna selja eina fyrstafloks vøru til ein bíligan penga!

import.fo



**Klædningurrin frá okkum er viðlíkahaldsfríur og hevur allar teir fyrimunirnir, sum træi hevur, men uttan vansarnar – sum gjørdur til føroyska veðurlagið!**

Vit kunna bjóða vindeygu og hurðar framleid úr plast, træ, mahogny, eik og alu-træ. Vit hava, stutt sagt: »vindeygu, tær tørvar, fyri prís, tú ynskir!« Nøgd, snið og stødd eftir tygara ynski, einki er standard.






Skotarók 3 · Box 3070 · FO-110 Tórshavn · tel: 321 521 · import@import.fo · www.import.fo








handverkarin_28_2008.indd 28 4/12/08 16:27:50









handverkarin_28_2008.indd 29 4/12/08 16:27:51

Ídnaðar- og garaguhurðar
Spyr fyrst hjá okkum: tlf. 31 99 92

Sp/f. Tórshavnar Maskinverkstaður
Vestara bryggja - Box 3135 - FO 110 Tórshavn




VARTA

Battariir Til Øll Endamál
Fartelifonir
Hoyri Apparatir
Ur og mangt annað
Eisini hava vit øll vanlig battariir

Heil- og smásøla, landsins bestu battariir, og landsins bestu prísir

PÓLAR

elmek
v/Magnus Magnussen · Gripsvegur 18 · FO-100 Tórshavn
tel 317352 · far 217700 · elmek@post.olivant.fo
Alt el- og edvarbeiði verður gjørt skjótt og væl



handverkarin_28_2008.indd 30 4/12/08 16:27:52

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



- ✓ *Handverksútbúgvingar*
- ✓ *Støðisútbúgving*
- ✓ *Yrkisakademiútbúgvingar*
- ✓ *Skúlaheim*

*Marknagilsvegur 75 • Postboks 3239 • 110 Tórshavn • telefon 308050 • telafax 308051*

*www.tst.fo • tst@tst.fo*



**Lyklaklár fígging og trygging til bilin**

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bila søluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*

www.sansir.fo



handverkarin_28_2008.indd 31 4/12/08 16:27:53

# Saman við okkum røkkur tú

FØROYABANKI

# longri

Sum hollur viðleikari í vinnulívinum hevur Føroya Banki kunnleika og kapasitet til at fremja møguleikarnar í tíni fyritøku.

Í 100 ár hevur Føroya Banki vegleitt og fíggjað føroyskt vinnulív í góðum sum ringum. Hesa tíðina hava Føroyar verið fyri ovurstórari menning, og vit tora at siga, at Føroya Banki hevur verið ein týðandi partur av gongdini. Hesi 100 árini hava lært okkum nógv, og vit eru klár til meira.

www.foroya.fo

SENDISTOVAN